


**SÓLSKINSSØGA**

*Arctic Viking kom til Føroya í 1986 og hevur yvirlivað bæði góðar og minni góðar tíðir innan føroyska rækjuskipavinnu*

# KOLLFIRÐINGAR BETRI ENN AÐRIR

**RÆKJUR** Hvat duga kollfirðingar, sum aðrir ikki hava dugað, tá rækjutrolarin Arctic Viking er einasti føroyski rækjutrolari, sum ongantíð hevur skift eigara – og hevur yvirlivað bæði góðar og minni góðar tíðir innan føroyska rækjuskipavinnu

Vilmund Jacobsen

Tað eru seks mans í Kollafirði, sum eiga felagið P/F Líðin, ið eigur og rekur rækjutrolaran, Arctic Viking. Skipið, sum kom til landið í 1986, er hin einasti føroyski rækjutrolarin, sum øll hesi ár ongantíð hevur skift eigara – og ongantíð er farin av knóranum.

Tað var tann tíð, tá føroyski rækjuflotin taldi fleiri skip og førdi dýran fong til lands, sum breyðføddi nógvar føroyskar familjur. Á Oyri var rækjuvirki, har nógv fólk høvdu sína inntøku.

Í dag er eingin framleiðsla á rækjuvirkinum á Oyri, og bert tveir rækjutrolarar eru eftir í føroyska fiskiskipaflotanum. Aftrat Arctic Viking, er tað Havborg, sum leirvíkingar eiga. Leirvíkingar áttu eisini Fríðborg, sum varð seld í vár.

## Ikki vánaligast

Jóhan Joensen, reiðari á Arctic Viking, ásannar, at fleiri ár hava verið tung, tá veiða ella prísir hava svikið, men felagið hevur klárað skerini og hevur eisini í keðiligu tíðunum megnað at varðveitt skipið í føroyska fiskiskipaflotanum.

- Í løtuni er Arctic Viking á Flemmish Kap, og onkuntíð hevur sæð verri út, enn tað ger í dag, nú útlit eru til, at samanhangur aftur er í rakstrinum.

Reiðarin vísir á, at nú færri skip eru í rækjuskipaflotanum, munar kvotan í Eysturgrønlandi upp á 1335 tons eisini so mikið meiri.

- Henda kvota hevur altíð havt stóran týdning, og í dag munar hon ikki minni, leggur hann aftrat.

## 18 mans umborð

Við Arctic Viking eru 18 mans, og skiparar eru Bjarni Petersen, sum er umborð hendan túrin og Niclái Petersen, sum hevur frítúr.

Jóhan Joensen, reiðari, sigur, at gjøgnum øll hesi mongu ár hava menn úr at kalla øllum landinum verið við skipinum.

Sosialurin fer ikki í hesi greinini at fregnast eftir, hvat kollfirðingar hava dugað, sum onnur feløg í Føroyum, ið hava rikið rækjuskip, ikki hava dugað líka væl.

Hinvegin kann staðfestast, at Arctic Viking, sum kollfirðingar øll hesi ár hava átt og rikið, er hin einasti føroyski rækjutrolarin, sum hevur megnað at yvirlivað, bæði í góðum og minni góðum tíðum innan hesa vinnugrein.

vilmund@sosialurin.fo